

# Úr kaos kemur ordan...

**G!-FESTIVALURIN** G!festivalurin 2010 var ein heldur øðrvísi uppliving, enn tey flestu høvdu vónað, ætlað og roknað við. Vindurin ýldi, og himmalsins slúsir stóðu víðopnar allan hósdagin, og hóttu við at skola alt tiltakið á hav saman við tjøldunum, ið fuku av tjaldingarøkinum. Men tá alt kom til alt, gjørdist festivalurin ein góð uppliving, sum er verd at minnast

Sissal Kampmann

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Hósdagin sóust festivalgestir í gummistivlum, regnklæðum og við fullum upppakningi ganga eftir vegnum sum villfárilsi millum bilar og hús, leitandi eftir terra og nærri boðum um, hvussu leikur fór at fara við tiltakinum, sum tey høvdu glett seg til í fleiri mánaðir.

Syðrugøta, ið vanliga er full av glaðum fólki beinanvegin G! byrjar, var so at siga manntóm.

Niðri á torginum stóðu allir básirnir tómir, sandurin var burtur, tann stóri pallurin stóð og sveiggjaði í nógva vindinum, síðurnar á pallinum á spæliplássinum skryktu seg leysar og áirnar stóðu fullar í vatni. Av og á hoyrdist, at alt var avlýst, fyri hareftir at verða avsannað aftur. Tað var tí ringt hjá teim flestu at halda tí góða lagnum uppi á einum støði, ið kundi yvirvinna karmin og óvissuna um, hvussu leikur fór at fara, men tey flestu megnaðu tó at halda stand, eftir at tey høvdu funnið okkurt stað at kroka, skifta klæði og turka teir vátu soviposarnar.

Hóskvøldið byrjaði festivalurin so endiliga av álvara, og hóast komandi dagarnir vóru eitt virvar av skráum, ið javnan blivu broyttar, regni, sól, vindi, streymsliti osfr. bleiv G! 2010 ein uppliving, ið alt í alt verður verd at minnast. Ikki bert fyri tónleikin, men eisini fyri tann stemningin, gestablídni og viljan til at fáa tiltakið at eydnast, hóast náttúran vísti seg frá síni súru síðu. Skráin var góð og fjølbroytt, og hóast pallurin á sandinum mátti lúta fyri aldunum og takast niður, so allar stóru konsertirnar máttu spælast á spæliplássinum, har ljóðútgerðin ikki var hin sama sum á stóra pallinum, spældi G! so væl av sum tað yvirhøvur kundi, soleiðis sum umstøðurnar vóru.

# EITT ENDURNÝGGJAÐ GØTUBARN

**G!-FESTIVALURIN** Eivør gav áhoyrarunum tað, tey vóru komin eftir. Við grundarlagi í nýggju plátuni, Larva, var konsertin við Eivør ein vælsamanhangandi og vælspæld eind, har áhoyrararnir tó eisini fingu høvi at hoyra fleiri av hittunum hjá Eivør og harvið møguleikan at syngja við henni

Sissal Kampmann

*Myndir: Jens Kristian Vang*

Drottningin úr Syðrugøtu, Eivør Pálsdóttir, stóð ikki aftanfyri drottningina av metalli, tá hon fór á pall á spæliplássinum í heimbygdini fríggjanáttina.

Hóast Eivør og Angela Gossow í Arch Enemy, milt sagt eru sum nátt og dagur tónleikaliga, eru tær tó ikki heilt ólíkar. Líkheitirnar koma av, at tær báðar hava eina eina ótrúlig orku og útstráling. Ikki minst hava tær ein heilt serligan hátt at framføra uppá, sum ikki kann annað enn hugtaka áhoyraran, ið við hesum ótrúliga evnaríku kvinnum fær innlit í ein part av tónleikaheiminum, ið ikki er at finna á hvørjum horni.

Í Føroyum er og verður Eivør nakað heilt serligt. Hon er okkara egna superstar, sum vit eru so ótrúliga stolt av, og hon kann uttan iva sammetast við størstu sangkvinnurnar í heiminum. Hon hevur fingið óteljandi stjørnur og bestu viðmæli úti í heimi, og tað tykist ikki, sum um tað er nakað øki av tónleikinum, hon ikki meistrar.

Eivør hevur, síðan hon á fyrsta sinni gjørdi vart við seg sum blaðung, flutt seg frá genru til genru. Tey flestu okkara hava tó altíð funnið okkurt, sum okkum dámar í hennara tónleiki og í hennara útgávum og framførslum, líkamikið hvar hon hevur verið reint tónleikaliga.

## Okkara serliga Eivør

Eivør hevur nøkur heilt serstøk evni til at hugtaka og bergtaka, kanska serliga, tá hon spælir í føroyskum umstøðum, har hon er uppvaksin. Tað er, sum um hennara røddd og háttur at framføra uppá, gongur upp í eina heilt serliga hægri eind, tá hon er undir føroyska himmalinum. Spæliplássið var tí sum væntað so at siga fult, tá Eivør fór á pall saman við bólki sínum, ið umframt Eivør telir Mikael Blak, Benjamin Petersen, Høgna Lisberg og limir úr kórinum Empiri um miðnáttarleitið fríggjakvøldið.

Saman við hesum ótrúliga dynamiska bólki og Jens L. Thomsen, sum er maðurin, ið hevur framleitt fløguna "Larva", sum kom út í vár, er hon farin aftur til tann stílin, vit kenna frá tíðini í Clickhaze. Á nýggju fløguútgávuni leitar Eivør aftur til tað meir ráa og villa - til tað meir rokkuta. Sum skrivað hevur verið, hevur samstarvið við Jens og við bólkin givið eitt úrslit, ið bæði er myrkt og innatvent, samstundis sum tað er "in your face". Minimalistiskt men tó stórt.

Eisini hevur verið sagt, at huglagið á fløguni stundum er klassiskt, mytologiskt, tó eisini vandamikið og ófrættakent. Ikki minst er samlaða ljóðmyndin hjá Eivør á nýggju útgávuni sera áhugaverd orsakað av skitna ljóðinum, sum serliga Benjamin Petersen og Høgni Lisberg eiga æruna av. Ljóðmyndin er samstundis samansett av streingjum, moogum, sythbassum og øðrum finurligheitum, og kórið ger sanniliga eisini sítt til, at heildarmyndin er sera væleydnað og gjøgnumførd. Á henda hátt ber til hjá Eivør at vísa sínar ótruligu sanggávur, uttan at tað gerst ov nógv. Hon fær loyvi at sveima, men verður alla tíðina tvungin niður aftur á jørðina av tungu grundini í tónleikinum.

## Positiv tónleikaupliving

Fríggjakvøldið tók endurnýggjaða Eivør pallin við eini stórari lívsgleði -og ikki minst eini tónleikagleði, sum beinanvegin smittaði áhoyrararnar, sum sungu og dansaðu saman við henni frá byrjan til enda.

Framførslan gjørdist betur av, at hon megnaði at taka støði í, at allar umstøðurnar fyri festivalin vóru broyttar av veðrinum, og millum annað ljóðgóðskan tí var ávirkað í ein mun, ið kundi verið óheppin.

Tað týðningarmesta var, at Eivør og bólkurin vistu, at tað, alt í veruleikanum snúði seg um, var at geva áhoyrarunum eina góða og positiva tónleikauppliving, ið kundi flyta fokus frá teimum trupulleikum, festivalurin og gestirnir høvdu verið plágaðir av. Nú var nokk tosað og hugsað um regn og vind, og heldur tíð uppá at hava tað stuttligt og at njóta tónleikin, samveruna og lívið sum tað er.

Tá hon fór á pall, vóru veðurgudarnir við henni. Regnið helt ein steðg eina løtu, vindurin var stilnaður, gestirnir vóru í betri lag enn undanfarna dagin, og hýrurin, ið hevði verið eitt sindur tungur fyrr um dagin, var vorðin nógv betur enn hann hevði verið frammanundan. Eyðkendi G!stemningurin var akkurát, sum hann skuldi vera.

Eivør gav áhoyrarunum tað, tey vóru komin eftir. Við grundarlagi í nýggju plátuni, Larva, var konsertin við Eivør ein vælsamanhangandi og vælspæld eind, har áhoyrararnir tó eisini fingu høvi til at hoyra fleiri av hittunum hjá Eivør og harvið møguleikan at syngja við henni.